**Heimarøktin og Serforsorgin**
Røktarheimið á Mørkini, 435 Streymnes

# Røktarheimið á Mørkini Søkir eftir heilsurøktarum og sjúkrarøktarfrøðingum

Røktarheimið á Mørkini er ein samskipaður partur av Heimarøktini Vágar/ Norðstreymoy.

Á Røktarheiminum á Mørkini eru 32 búpláss býtt út á 4 eindir við 8 búplássum á hvørjari eind. Til hvørja eind er felags køkur og stova. Búeindirnar eru sambundar av einum meginbygningi, ið umfatar meginkøkin, hølir til ergo- og fysioterapi og sal til felagstiltøk á heiminum. Aðalsetningurin fyri heimið er, skapa eitt so heimligt og livandi umhvørvi sum gjørligt.

Heimið opnaði í maj 2006 við 16 røktarheimsplássum og í løtuni eru vit í ferð við at taka síðstu eindirnar í brúk. Í hesum sambandinum sóknast vit eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum at arbeiða 0,7 tíð í blandaðum vaktum at byrja 1. oktober 2006 ella skjótast tilber.

**Vit søkja eftir fólki:**
- við røktarfakligum royndum
- hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- hevur áhuga fyri at starvast innan elddrarøkt
- kennir gleði við at vera saman við gomlum fólki.

**Vit kunnu bjóða:**
- góðar arbeiðsumstøður í nýggjum heimi
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við nógvum avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Størvini eru lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til deildarleiðaran á Mørkini á telefon 505440.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av autorisatión, prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Røktarheimið á Mørkini**
435 Streymnes

**Att: Annika Vágsheyg**

**Umsóknarfreist: 27. september 2006.**

FAROE SEAFOOD



# BÓKHALDARI

Søkt verður eftir einum bókhaldara, at byrja sum skjótast.

Persónurin vit leita eftir, hevur hóskandi útbúgving sum t.d. skrivstovuútbugving ella líknandi. Arbeiðsroyndir við bókhaldsskipanina Axapta er ein fyrimunur.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Løn sambært avtalu

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jens Paula á telefon 594001

Umsóknarfreistin er 29. september.

P/F FAROE SEAFOOD TÓRSHAVN
VESTARA BRYGGJA · FO-100 TÓRSHAVN
TLF. 355555 · TELEFAX 312631



# FJM søkir eftir goymslulærlingi

Hevur tú hug at koma í goymslulæru hjá FJM í Runavík?

Vit ynskja, at tú hevur miðnámsútbúgving og at tú:

- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Hevur góðan teldu- og talførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

Harumframt er tað neyðugt, at tú hevur áhuga fyri mekaniskum og el-lutum.

Í lærutíðini fert tú at starvast á goymsluni í Runavík og møguliga eisini á goymsluni á Skála og í Tórshavn.

Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir lokna lærutíð.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

FJM Runavík
Postboks 192
FO-620 Runavík

Att.: Hans Jacob Poulsen

í seinasta lagi 25. sept. 2006.

Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Frithleif Olsen á tel. 50 11 96 ella við telduposti til frithleif.olsen@faroeyard.fo.

FJM RUNAVÍK

FJM Runavík
Fjøruvegur
Postboks 192
620 Runavík

Tel +298 30 11 90
Fax +298 30 11 91
fjm@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

*FJM er ein partur av skipasmiðjusamtakinum. P/F Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 300 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fevna um stál, aluminium, timbur, máling, beding, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving og beinleiðis søla. Skipasmiðjan hevur deildir í Tórshavn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

# KOYRIKORT? EYSTURINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 18. september 2006 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

Sosialurin
www.sosialurin.fo